


Jan Petersen frá B68 (v.m.) og Sámal av Reyni frá Reyni Service handa bilin og eitt blómutyssi til Jógvan Ingvard Olsen, hepna vinnaran av bilinum

# Corolla í føðingardagsgávu

## Toyota Corolla bilurin, sum ítróttarfelagið B68 herfyri burturlutaði, varð vunnin av Jógvani Ingvard Olsen á Toftum

**Magnus Gunnarsson**

Lutaseðlarnir hjá B68, har høvuðsvinningurin var ein Toyota Corolla frá Reyni Service, eru nú dregnir. Tann sum vann bilin var Jógvan Ingvard Olsen, fyrrverandi løgtingslimur, á Toftum.

Jógvan Ingvard fylti 80 ár hósdagin 8. juli, tann dagin tá bilurin varð handaður honum hjá Reyni Service í Hoyvík.

Bilurin er ein silvurlittur Toyota Corolla 1.4 D-4D Luna til eitt virði upp á 250.000 krónur. Jógvan Ingvard sigur, at fyrsti bilur hann keypti sær var eisini ein Toyota Corolla í 1974.

*maggi@sosialurin.fo*

# Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 17.15

Vitjað verður hjá Sp/f Kaj Andreasen & Co. í Hoyvík, har stjórin í fyritøkuni, Bergur Andreasen, fortelur um hvussu teir hava fyrireikað seg til summarið við sølu av t.d. viðfestisvognum og øðrum flutningstólum. Eisini um mangt annað sum fyritøkan hevur at bjóða.

Saman við Heðini Weihe, sølumanni hjá Auto Service, verður nýggi Opel Meriva royndarkoyrdur

Eisini er ein samrøða við Jógvan Ingvard Olsen á Toftum, fyrrverandi landsstýrismann og løgtingslim, sum vann høvuðsvinningin á lutaseðlunum hjá B68. Hann fortelur í sendingini, at hann minnist tíðina, áðrenn koyrivegur kom til Toftir og um fyrstu bilarnar har.



*Jógvan Ingvard Olsen fortelur í sendingini, at hann minnist tíðina, áðrenn koyrivegur kom til Toftir*




*Nýggi Opel Meriva verður royndarkoyrdur saman við Heðini Weihe, sølumanni hjá Auto Service*




*Bergur Andreasen, stjóri í Sp/f Kaj Andreasen & Co, sum m.a. umboðar Variant viðfestisvognar*

# Chrysler skifta til Lancia í Evropa

**Magnus Gunnarsson**

Chrysler skeltini hjá flestu bilforhandlarunum í Evropa verða í komandi ári skift út við Lancia skeltir.

Orsøkin er, at italsku Lancia eru partur av Fiat-konsernini, sum eigur 20 prosent av Chrysler í USA.

Nú er so avgerð tikin um at Chrysler bilarnir, ið verða seldir í Evropa, skulu marknaðarførast sum Lancia, sum annars er luksusbilmerkið hjá Fiat.

Chrysler skifta tó ikki til Lancia í Stórabretlandi og Írlandi, har Lancia ikki verða seldir. Amerikonsku Jeep, sum eru partur av Chrysler, skulu tó framvegis marknaðarførast sum Jeep í Evropa.

Fiat stjórin Sergio Marchionne roknar við, at sølan av amerikansku Lancia bilunum verður meira enn tvífaldað í 2014.

*maggi@sosialurin.fo*




*Her eru tær fyrstu myndirnar av Chrysler 300 í Lancia útgávu*




*Chrysler Voyager fer at eita Lancia í Evropa*